# Íslendenski gullvenjarin



Íslendski gullvenjarin hjá norsku landsliðskvinnunum, Thorir Hergeirsson

**HONDBÓLTUR** Thorir Hergeirsson stendur við ábyrgdini av norska landsliðnum, sum vann evropameistaraheitið í gjár. Íslendingurin hevur búð í Noregi í 24 ár

Uni Holm Johannesen

Thorir Hergeirsson vann sín største heiður sum hondbóltsvenjari í gjár.

Liðið, hann hevur havt ábyrgdina av síðan apríl í fjør, vann evropameistaraheitið.

Íslendingurin hevur verið partur av venjaratoyminum hjá norska landsliðnum seinastu 10 árini. Í fjør loysti hann Marit Breivik sum høvuðsvenjari.

Hann hevur áður staðið á odda fyri Eleverum Håndball, Gjerpen Håndball og Nærbø IL.

## Flutti tíðliga

Thorir Hergeirsson flutti til Noreg í 1986. Tá fór hann undir lestur á Norges Idrettshøgskole.

Hann hevur síðan tikið við fleiri avbjóðingum í norskum hondbólti. Hann situr nú á ovastu rók.

Noreg vann finaluna á Svøríki um evropameistaraheitið 25-20. Hálvleiksstøðan var 11-10 til Noreg.

## Byrjaðu væl

Noregi byrjaði væl. Liðið var á odda 4-2, men so var lítið veiggj í álopsspælinum eina løtu. Átta minuttir seinni komu favorittarnir aftur á máltalvuna.

– Tað var ein torførur dystur. Svøríki spældi væl og við toli. Vit tveittu nógvar bóltar burtur, men úrslitið kemur, um tú heldur fram at stríðast, sigur Thorir Hergeirsson við norska TV2.

Tað mest fantastiskta er, sambært venjaranum, at liðið hevur vunnið sær luttøku til evropameistaraheitið, heimsmeistaraheitið og OL.

– Tað gevur okkum arbeiðsfrið, heldur Hergeirsson.

Noreg setti ferðina upp í seinna hálvleik og fekk einu løtuna heili seks mál upp í slag. Svøríki, sum óvæntað hevði vunnið seg í finaluna, hótti ongantíð sigurin.

Marit Mal Frafjord er eisini fegin.

– Vit framdu fleiri óneyðug mistøk og noyddist tí at stríðast, sigur hon við TV2.

## Álitið

Stutt aftaná, at Marit Breivik takkaði fyri seg, kunngjørdi norska hondbóltssambandið, at Hergreisson tók við.

Tað var eingin ivi um, at hann var rætti avloysarin, var niðurstøðan.

– Hann fær ábyrgdina av heimsins besta kvinnuliga hondbóltsliði. Tað er ein stór avbjóðing at vinna við einum liði, sum hevur vunnið eina rúgvu frammanundan. Vit eru hinvegin sannførd um, at hann hevur neyðugu eginleikarnar, segði Arne S. Modahl, tá tað var greitt, at Hergeirsson tók við.

Tað vísti seg, at Modahl og hinir valdu rætt.

Íslendingurin hevur nú vunnið kvinnurnar úr Noregi upp á evropeiska tindin.

uni@sosialurin.fo



Norsku landslisðkvinnurnar í jólahýri eftir evropeiska gullsigurin



Jan Pytlick

# Pytlick er rasandi

**HONDBÓLTUR** Jan Pytlick, venjari hjá Danmark, er rasandi inn á leikararnar eftir bronsudystin, sum donsku kvinnurnar taptu við út av lagi vánaligum álopsspæli

Uni Holm Johannesen

Tað var nøktandi at lata 16 mál fara ígjøgnum móti Rumenia, men Danmark fekk bara 15 mál, og tað er ov vánaligt, heldur Pytlick.

Hann var so rasandi sum sjáldan fyrr og rópti eftir leikarunum aftaná dystin.

Úrslitið hevur við sær, at Danmark, umframt ikki at vinna bronsuheiðursmerki, missir beinleiðis kvalifiseringina til heimsmeistaraskapið í Brasilia næsta ár.

– Vit vóru als ikki til reiðar. Vit hava staðið okkum væl í kappingini, men tapið oyðileggur eina rúgvu. Eg eri sera vónbrotin. Vit hava arbeitt miðvíst, og so pissa leikararnir so langt við síðurnar í dag. Tað eru fleiri leikarar, sum skulu heim at hugsa, um tær vilja vera við á landsliðnum ella ikki. Um tær ikki kunnu spæla við fullari megi, so mugu onnur framat, sigur Pytlick við BT.

Danmark skal heldur spæla tveir alt-ella-einki dystir móti Póllandi fyri at vinna seg til HM-endaspælið.

Pytlick hevur sagt, at hann vil vinna gull undir OL í London í 2012. Ní er hann ikki vísir í, um tað er eitt realistiskt mál.

– Tað kann væl vera, at eg noyðist til hús at hyggja okkara mál ígjøgnum, um vit ikki kunnu spæla betri enn hetta. Vit eru fimm til sjey mál aftanfyri Noregi í løtuni, og tað er fleiri onnur lið, sum standa seg væl, sigur Pytlick.

# Vit eru errin

Per Johansson, svenskur landsliðsvenjari, er vónbrotin av, at Svøríki tapti finaluna.

Tað var lítið væntað av svenska landsliðnum undan kappingini. Tað hevur verið sum eitt ævintýr, men Noreg koppaði kvinnunum úr Svøríki á seinasta leikdegnum.

Per Johansson sigur, at Svøríki skal vera errið av sínum avrikum.

– Tað er ótrúliga harmiligt, at vit tapa seinasta dystin, men vit skulu erpa okkum av úrslitinum. Vit hava flutt okkum nógv fet rætta vegin, sigur Per Johansson, landsliðsvenjari.

uni@sosialurin.fo